Tiðindablaðið sosialurin Telefon 311820 Telefax 314720 Internetadressa: www.sosialurin.fo e–mail: post@sosialurin.fo

# Gó› ummæli í The Times

*Fyrr í ár kom út fløgan Cantus Borealis, har Blásarakvintett Reykjavíkar spælir verk hjá føroyskum tónaskøldum. Fløgan fær gó›a umrø›u í enska bla›num The Times*

DAGFINN OLSEN



Blásarakvintett Reykjavíkar leikar á fløguni Cantus Borealis verk hjá føroyskum tónaskøldum. Fløgan fær gó› ummæli í The Times

Cantus Borealis, Wind Music from The Faroe Islands. Solei›is nevnist fløga, har Reykjavik Wind Quintet saman vi› Gu›rí›ur Sigur›ardóttir leikar verk hjá føroyskum tónaskøldum.

Ein av limunum í íslendska bólkinum er Bernhar›ur Wilkinson, sum stjórna›i fyrstu føroysku symfoniini, Oceanic Days hjá Sunleif Rasmussen. Bernhar›ur hevur sjálvur røtur í Føroyum - er hálvur sumbingur. Í samband vi› symfoniina var hann í Føroyum og eisini restin av bólkinum, tí fløgan Cantus Borealis kom út um somu tí›. Reykjavík Wind Quintett hev›i tá konsertir í Føroyum.

Sermerkt vi› fløguni er, at hon er givin út í samstarvi vi› BIS. Hetta merkir, at fløgan kemur ví›a um á altjó›a markna›inum.

## Í The Times

Fløgan er í maj umrødd í enska bla›num The Times. Hilary Finch skrivar, og umrø›an er sera positiv.

Greinin byrjar vi›, at íslendska symfoniorkestri› leikti fyrstu føroysku symfoniina í Føroyum í februar og at til høvi› var Reykjavik Wind Quintet eisini í Føroyum, tí teir eru eisini vi› í symfoniorkestrinum.

Greinin nevnir verki› Cantus Borealis, eftir Sunleif Rasmussen, i› ver›ur nevndur ein av mest framúrskarandi (sophisticated) tónaskøldum Føroya.

Kristian Blak ver›ur nevndur „the islands musical alder statesman and festival director“. Verk hansara Stjørnur (Constellations) ver›ur sagt at flyta seg frá myrkum hornum, Orion, til Aurora Borealis. „A virtuoso tour- de-force“, har solistarnir gera sítt allar besta.

Eisini ver›a onnur av verkunum á fløguni umrødd og fáa gó› vi›mæli.

Sum heild sera gó› ummæli, i› fløga og tónaskøld fáa, eins og íslendsku tónleikararnir. Føroysku tónaskøldini , i› eru umbo›a› á fløguni, eru Pauli í Sandager›i, Atli Petersen, Kári Bæk, Kristian Blak, Edvard Nyholm Debess og Sunleif Rasmussen.

Ummæli› gevur 3 stjørnur, og vanliga er karakterstigin uppá eini 5 ella kanska 6 stjørnur. Júst hvussu nógv ver›ur givi› til hægsta karakter í The Times skal ver›a ósagt her.

Ummæli› stendur at lesa í The Times tann 23/5 2000, og má sigast at vera fagur tónleikur í oyrunum á teimum, i› fjeppast uppi í føroyskum, n‡klassiskum tónleiki.

# Veðrið



Fimm-daga-for-søgnin frá DMI

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið mikudagin**
Skýggjað veður men sólglóttar, og kanska ælaveður. Eitt lot til andøvsgul av landnyrðingi, 2-8 m/s, men hann minkar vindin til eitt lot av norði, undir 5 m/s. Hitin verður millum 6 og 10 stig, eitt sindur heitari, tá sólin skínur




**Hósdagin**
Mest skýggjað veður, men onkra løtu sirmar. Eitt fleyr, undir 5 m /s, og hitin millum 7 og 10 stig. Um náttina klárar í og vindur verður av vestri.




**Fríggjadagin og leygardagin**
Skýggjað veður við eitt sindur av sól og eitt lot til gul av vestri, 2 - 5 m/s. Hitin verður millum 6 og 10 stig.

**Sunnudagin**
Vindurin lækkar til lot til andøvsgul av suðri, 3 - 8 m/s. Tað verður skýggjað veður og regn av vestri. Hitin verður millum 8 og 11 stig.




Eitt hátrýst, 1025 hPa, yvir Íslandi stendur í stað komandi samdøgrini og viknar, seinni fer hátrýstið í ein eystan, og um vikuskiftið nærkast eitt brúgvalag Føroyum úr vestri




Eitt andøvsgul av landnyrðingi, skýggjað veður og kanska ælaveður. Hitin um dag upp til 10 stig. Um náttina lækkar hann vindin til eitt gul og hitin fellir til fimm stig




**Hitalagið mált frá 03./07. kl 06⁰⁰–04./07. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,9°C**
Minsti hiti máldur í juli: **0,4°** Mesti hiti máldur í juli: **20,2°**




Avfallið: 0,0 mm – **mált frá 03./07. kl 6⁰⁰–04./07. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í juli: 0,0 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 11 |
| Nuuk | 13 |
| Qaqortoq | 12 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 17 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 24 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannahavn | 16 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 24 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 31 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 38 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | – |
| Sydney | 15 |
| New York | 27 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 16 |

## Vestfalskyrrindi

4. juli: Jørðin longst frá sólini
8. juli: Fyrra kvarter

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. juli | 9.49 | 22.09 | 8.49 | 21.09 | 9.04 | 21.24 | 11.49 | – | 0.28 | 12.49 | 8.04 | 20.24 | 7.04 | 19.24 | 10.04 | 22.24 | 11.04 | 23.24 | 9.34 | 21.54 | 10.49 | 23.09 |
| 6. juli | 10.32 | 22.55 | 9.32 | 21.55 | 9.47 | 22.10 | 0.09 | 12.32 | 1.09 | 13.32 | 8.47 | 21.10 | 7.47 | 20.10 | 10.47 | 23.10 | 11.47 | – | 10.17 | 22.40 | 11.32 | 23.55 |
| 7. juli | 11.21 | 23.46 | 10.21 | 22.46 | 10.36 | 23.01 | 0.55 | 13.21 | 1.55 | 14.21 | 9.36 | 22.01 | 8.36 | 21.01 | 11.36 | – | 0.10 | 12.36 | 11.06 | 23.31 | – | 12.21 |
| 8. juli | – | 12.14 | 11.14 | 23.44 | 11.29 | 23.59 | 1.46 | 14.14 | 2.46 | 15.14 | 10.29 | 22.59 | 9.29 | 21.59 | 0.01 | 12.29 | 1.01 | 13.29 | 11.59 | – | 0.46 | 13.14 |

Kelda: Skipalistin 2000